# ENDAMÁL, VISJÓNIR & NÝGGJUR BYGNINGUR



lívdin
- í lívd hins hægsta

**Heilsan frá Jógvan Zachariassen**



Dávid græt, tí einki hús varð bygt Harranum í Jerúsalem, samtíðis sum fólkið búði í prýðiligum húsum. Sorg Dávids umbroyttist til gleði, tá ið Sálomon steig fram og segði: "Nú ætli eg at byggja navni HARRANS Guds míns hús og halga Honum tað, so vit fáa brent angandi roykilsi fyri ásjón Hansara, lagt fram sýnisbreyðini, sum altíð skulu liggja, og ofrað brennioffur morgun og kvøld... Húsið, ið eg ætli at byggja, skal vera stórt; tí Gud okkara er størri enn allir gudar. Men hvør man vera mentur at byggja Honum hús! Himlarnir, ja, Himlar Himlanna, taka Hann ikki – hvør eri tá eg, at eg skuldi bygt Honum hús, um tað ikki eina var til at brenna roykilsi fyri ásjón Hansara!" (2. Krøn. 2:4–6).

Sálomon visti, at einki hús kundi rúma Gudi, men hann ynskti at veita umstøður, har fólk Guds kundi tilbiðja Gud og tæna Honum. Sálomon hevði fleiri endamál við húsi Harrans. Í fyrsta lagi, at gera navn HARRANS stórt – hetta er tilbiðjan; í øðrum lagi, at gera nærveru HARRANS sjónliga – hetta er trúboðan; í triðja lagi, at gera tænastuna fyri Gud møguliga – hetta er tænasta; í fjórða lagi, at geva fólki eitt stað at hittast regluliga – hetta er samfelag; og í fimta lagi, at hjálpa fólki Harrans at liva virðiliga – hetta er læra.

Lívdin ynskir at byggja ein bygning, har øll gera navn HARRANS stórt (tilbiðjan); har øll kenna nærveru hansara sjónliga trúboðan); har øll kunnu gera tað ómøguliga (tænasta); har øll kunnu hittast regluliga (samfelag); og har øll eru eggjað til at liva virðiliga (læra).

Hoyvík er tað øki í Føroyum, sum veksur skjótast, og um nøkur ár fara eini 7000 fólk væntandi at búgva har. Menniskju allastaðni hava tørvir – bæði tímiligar og andaligar – og síðani 2001 hevur Lívdin roynt at bera fram kærleika Jesusar, sum skapir andaligan, tímiligan og persónligan trivnað í allari familjuni og í øllum ættarliðunum. Virksemið í Lívdini hevur verið útint á nógvar ymiskar hættir: við møtum fyri alla familjuna, tilbiðjanarmøtum, undirvísing, sangi og tónleiki, drama og leikum, sunnudagsskúla, frítíðararbeiði, barnatiltøkum, barnaansing, ungdómstiltøkum, bønartænastum, húsbólkum, hirðatænastum, ráðgeving, skeiðvirksemi, praktiskum tænastum o.ø. Núverandi tiltøk eru í Hoyvíkar skúla og í leigaðum hølum á Brekku 3 í Hoyvík.



Vit ynskja at byggja ein bygning, har evangeliið um Kristus Jesus óskert verður boðað. Ein bygning, sum børn okkara fara at kalla sítt andaliga heim. Ein bygning, har ung og vaksin koma at síggja Gud til verka. Ein bygning, har boðskapurin fer at hjálpa øllum at liva lívið væl og rætt. Ein bygning, sum er fullur við aktivitetum, og har ljósini sjáldan verða sløkt. Ein bygning, sum er viðkomandi og virkin í okkara samtíð. Vit ynskja okkum arbeiðsfólk, sum fegin vilja gera navn Harrans sjónligt og stórt. Bøn okkara er, at tú vilt koma við og byggja!!



*Bygningurin sæddur frá vestan á Vegnum Langa. Bygningurin verður opin og innbjóðandi. Innanífrá verður útsýni móti Ternuryggi og*

**Grundstøði –** endamálini hjá Lívdini

Lívdin hevur ein endamálssetning, sum er grundaður á orð Jesusar í Matt. 28:16–20. Hesi fimm endamál umboða alt tað, sum vit gera í Lívdini:

Tilbiðjan – *táið teir sóu Hann, tilbóðu teir Hann* – at dýrmæta Gud

Trúboðan – *gerið øll fólkasløg til lærisveinar* – at breiða út frelsuætlan Guds

Tænasta – *farið tí út og gerið* – at hjálpa menniskjum

Samfelag – *doypið teir* – at vísa umsorgan

Læra – *lærið teir at halda alt, ið Eg havi boðið tykkum* – at liva Guds endamál




**Kjarnuvirði –** tað, sum eyðkennir Lívdina

Kjarnuvirði er hugburðurin og eyðkennini, sum bíbilsku endamálini og meginreglurnar flóta ígjøgnum. Lívdin hevur trý kjarnuvirði:

viðkomandi ~ Hava fingurin á pulsinum í samtíð okkara, stuðla og eggja samkomuni til at vera virkna, skapandi og nýhugsandi í samfelagnum.

frælsi ~ Glaður, frælsur, náðiríkur og frískur kristindómur skal eyðkenna Lívdina.

ábyrgd ~ Fyrimyndarliga at elska næsta okkara og vísa ábyrgd, dygd og umsorgan í øllum, sum vit gera.




**Visjón** – dømi um tær visjónir, sum Lívdin ynskir at útinna í verki

Vit ynskja at gera lærisveinar við at:

luta kærleika Guds á ein sjónskan og viðkomandi hátt

stuðla teimum, sum stríðast so tey ikki stríðast einsamøll

kenna Gud og ganga vegir hansara

finna gleðina at tæna Gudi og menniskjum

æra Gud við góðum tónleiki, sangi og skapandi list

byggja ein bygning, sum skal vera karmur um allar visjónir okkara

hjálpa neyðstøddum, berjast móti órættvísi og breiða út kærleika Kristusar úti sum heima

**Bygningurin**
Síðani Lívdin byrjaði, hava vit havt fyri eyga at byggja ein nútíðarhóskandi samkomubygning. Endamál samkomunnar mynda bygningin, og tí skal virksemið í nýggja bygninginum eyðkennast av tilbiðjan, trúboðan, tænastu, samfelagi og læru.



*Stór og opin forhøll*



*Flatmynd — fyrsta*

Aktivitetir í bygninginum

Umframt núverandi virksemi, vilja vit eisini hava ein bygning, sum skal víðka møguleikar okkara at náa út. Tá ið ein kemur inn í bygningin, kemur hann inn í eina stóra, opna, rúmliga og ljósa forhøll, ið skal virka sum savningarstað, áðrenn og aftaná samkomufundirnar í salinum. Inni í forhøllini er eingin orsøk at keða seg, tí har verður regluligt virksemi, eitt nú bókasøla, óformellir fundir, akustiskar konsertir, listaframsýningar o.a.

Inni í kaféini verða dagliga 60–80 sitipláss við kaféborðum, sum standa út ímóti glasútvegginum við góðum útsýni. Forhøllin er høvuðsgøtan í húsinum, haðani samband er til fundarhølir, barnaansingarrúm, wc, handikapp–wc, garderobur og onnur hjárúm.

Tann stóri salurin, høvuðshøllin, sum kemur at taka um 800 fólk, skal, umframt tey vanligu møtini, eisini nýtast til ymiskar konsertir, ráðstevnur, framsýningar og mentanar– og tónleikatiltøk.

Aftan fyri høvuðshøllina er gott og rúmligt backstage–umráðið við øllum hentleikum, so sum umskiftingarrúmum, venjingarrúmum, wc og brúsum, o.ø. fyri tey, sum skulu framføra ella luttaka á pallinum.

Í sambandi við forhøllina og kaféina, er atgongd til ungdómssentrið, har tey ungu dagliga kunnu savnast at hugna sær. Ungdómssentrið kemur at vera eitt stórt øki, sum sunnudagar eisini verður nýtt til sunnudagsskúlan og annars eisini til frítíðararbeiði og møti við færri enn 220 fólkum. Óivað verða hølini sum oftast nýtt til ungdómskafé, har tey ungu sita við borð og hugna sær saman við spølum og góðum práti. Vónandi verður hetta eitt stað, har tey ungu fara at kenna seg heima og kalla sítt andaliga heim. Hvøi verður eisini at nýta hesi høli til onnur tiltøk.

Tá gingið verður upp ígjøgnum tær rundu høvuðstrappurnar, er balkong við útsýni niður í kaféina. Bókasavnið, sum er prýtt við góðum bókum og lesiborðum, kann býtast upp við hillum til fleiri øki og ymiska nýtslu, t.d. teldu/internet øki, lesiøki og leksiukafé.

Á ovaru hædd verða undirvísingarrúm. Hesi eru ætlað til sunnudagsskúla, lívsdropar, bíbliuskúla, skeiðvirksemi, venjingar, fundir, bólkarúm o.a. Serstovurnar á suðursíðuni hava serligar rýmingarleiðir, sum gera tær egnaðar til kreativt arbeiði.

Leiðin gongur so út á balkongina og vit koma til skrivstovu– og fundarøkið. Hetta verða skrivstovur hjá samkomuleiðara og øðrum fulltíðar fólkum í Lívdini. Vit vóna, at trúboðarar í farloyvi eisini kunnu brúka skrivstovurnar. Hesi rúm kunnu eisini nýtast til serstaka ráðgevingartænastur, sum Glóðin bjóðar fólki við ymiskum trupulleikum í lívinum, umframt til kvirru- og bønarrúm.

Leiðin gongur síðani inn í stóra salin, høvuðshøllina, og vit koma út á balkong, sum hongur út yvir salin í neðra. Á balkongini verða 210 sitipláss á føstum bonkum. Hetta økið kann eisini nýtast til undirvísing, skeiðvirksemi, framløgur og annað.

Einasta dagslýsi, ið kemur inn í salin er ein smøl loddrøtt rípa í síðuvegginum fremst í salinum. Hendan rípan er frá gólvi til loft.



*Flatmynd — onnur*







**Byggistig**

Byggingin fer fram í stigum, sum verða lagað eftir fíggjarliga førleikanum.
Fyrsta byggistigið, planeringin, er longu liðugt og stendur klárt at byggja á.
Annað byggistig, "BETONGKONSTRUKTIÓNIN", umfatar fundament, lendisgólv, veggir, súlur, skilagólv og takdekk úr berandi betong.
Triðja byggistig, "INNILOKAN", umfatar vindeygu, úthurðar, lættar útveggir, bjálving, takdekking, umframt fyribils hita í allan bygningin.
Fjórða byggistig, "INNFLYTAN", umfatar innandura kompletering og yvirflatur í frontbygningi.
Tá ið vit eru flutt inn í bygningin, byrja vit arbeiðið við stóra salinum og innrættingina av restini av bygninginum, sum umfatar skrivstovur, undirvísingarhøli o.a.

**Fakta**
Grundmát: 1724 m2 í tveimum hæddum.
Gólvvídd: 2705 fermetrar
Sitipláss: 800 fólk í stóra sali og 230 pláss í ungdómssentri.
Stað: Við Vegin Langa
Byggiskrá: Byggingin fer fram í stigum, sum verða lagað eftir fíggjarliga førleikanum.
Arkitektur: Selmar Nielsen
Ráðgevar:
Selmar Nielsen, arkitektur, Sp/f, LBF, ráðgevandi verkfrøðingar, Pf. Sofus M. Jakobsen, ráðgevandi verkfrøðingar, F.R.I., Steingrund Akustik, ráðgevandi verkfrøðingur, SP/F KJ Elráð, ráðgevandi verkfrøðingar.




Lívdin liggur á einum sera sjónligum staði við framsíðuni ímóti ferðslumikla Vegnum Langa og við sera góðum útsýni vestur– og suðureftir og verður partur av handils– og miðstaðarøkinum í Hoyvík. Bygningurin er lagdur í umhvørvið í samljóði við heildarætlanirnar hjá Tórshavnar Kommunu, bæði í mun til sethúsaøkið norðanfyri, samstundis sum vestursíðan og útsynningshornið hava sín stórbýardám.

Inni á økinum er dentur lagdur á, at atkomu– og parkeringsviðurskiftini eru so góð, sum gjørligt.

Á eystursíðuni er ætlanin at gera eitt torg, sum bindur bygningin og fríøkið saman, og sum skal gerast eitt natúrligt stað hjá fólki at savnast og sum kann nýtast til ítrótt, aktivitetir, konsertir og grill–festir okkurt gott summarkvøld í Hoyvík.

Vit vóna at fólk, sum koma til ella frá Svartafossi leggja leiðina gjøgnum grundøkið hjá Lívdini og koma inn á vegnum at fáa sær ein kaffimunn, at lesa tíðindi ella bøkur, brúka internetið ella hava eitt gott prát við onkran, áðrenn tey leggja leiðina víðari.

Dreymur okkara við hesum bygningi er, at fólk í øllum aldrum og frá øllum støðum í landinum og uttanlands, skulu hava eina natúrliga gongd inn og út í bygninginum hjá Lívdini og ikki bara til møti og onnur tiltøk í Lívdini.

Visjónir við bygninginum

*Grundað á endamál samkomunnar, vilja vit siga um bygningin, at bøn og ynski okkara er, at nærvera Guds skal fylla hann, og at øll, sum koma har, skulu verða treytaleyst elskað, hjálpt, víst náði og vegleidd, hvussu tey kunnu liva eftir vilja og endamáli Guds.*



***Høvuðshøllin***

**Umhugsni við trúgv**
Talan er um ein stóran bygning, og greitt er, at kostnaður av bygninginum er stórur, men latið okkum minnast, at vit hava ein stóran Gud, sum eggjar okkum at taka stór og djørv trúgarstig.

**Tú kanst stuðla Lívdini**
Tú kanst stuðla Lívdini í bøn, í ymiskum tænastum og við fíggjarligari hjálp, sum kann setast á konto í Eik 9181–530.707.6 sum vanlig ella føst flyting.

Leggur Harrin tær á hjarta at vera við í byggingini við praktiskum ella fíggjarligum stuðli, hoyra vit fegin frá tær.

Reglulig kunning á heimasíðuni - www.livdin.fo og www.ung.livdin.fo




**Vikuligu tiltøkini í Lívdini**

Sunnumorgun í Hoyvíkar skúla
10:30 Familjumøti & barnaansing
11:30 Samfelagsløta við te og kaffi
12:30 Tilbiðjan– og læra, barnaansing, sunnudagsskúli og UngLív

Mánadag á Brekku
17:00 Lívsdropar (frítíðararbeiði)

Týsdag á Brekku
20:00 Bønaløta, trúboðan og undirvísing
Húsbólkar eru triðja hvørt týskvøld

Mikudag á Brekku
19:00 Venjing og undirvísing fyri tónleikarar

Fríggjadag á Brekku
10:30 Mammubólkur annan hvønn fríggjadag
12:10 Bønaløta

Fríggjakvøld í Hoyvíkar skúla
21:00 Ungdómstiltak

Leygarmorgun
Bønarmorgunmatur fyri kvinnur – triðja hvønn leygarmorgun

Samkomuleiðari: Jógvan Zachariassen (522212)

Sálarhjálp: Glóðin (280011)

**Ymiskar tænastur í Lívdini**

Lovprísan, so sum sangur/tónleikur, drama/leikur, teknikk/ljóð, bøn, bønabólkar fyri kvinnur, bønabólkar á Brekku, tiltøk í og út frá Lívdini

Hirðatænastur, so sum Glóðin, umsorganartænastan, hjálparhondin, forbønartænastan og húsbólkar

Missión, so sum missiónsbólkur, Eldrabýli í Hoyvík, kvinnumøti, International's, Christmas Child og trúboðarar okkara

Útbúgving, so sum læra/tala á møtum og tiltøkum, skeiðvirksemi, bíbliuskúli, kjak forum, tiltøk í og út frá Lívdini

Barna- & ungdóms arbeiði, so sum barnaansing, sunnudagsskúli, UngLív, barnatiltøk á møtum, Lívsdropar, mammubólkur og ungdómsarbeiði

Miðlatænastur, so sum streeming, heimasíðan, kunningarritið og faldarin

Umsiting & praktiskar tænastur, so sum uppseting, baking/vasking, byggibólkur, fíggjarbólkur og praktiskt arbeiði



*Leiðslpøri*

**Kontaktpersónar**

Jens & Elin Wang, tlf. 322200
Jóhan & Rita Syderbø, tlf. 319626
Jógvan & Unn Zachariassen, tlf. 322212
Jákup & Sunnva Jacobsen, tlf. 315447
Ólavur & Ása Jøkladal, tlf. 317181
Guttorm & Súsanna Joensen, tlf. 319899
Rúni & Ilda Lómstein, tlf. 505959

*Á ein viðkomandi, frælsan og ábyrgdarfullan hátt, at gera lærisveinar, sum dýrmeta Gud við at liva Guds endamál, breiða út frelsuætlan Hansara, hjálpa menniskjum og vísa umsorgan.*

lívdin
- í lívd hins hægsta